# Leyp í sama stað

**SKRIÐULOP** Ikki fyrr enn á middegi í dag var koyrandi aftur á Syðradalsvegnum á Streymoynni, tí tað tók sina tíð at rudda vegin eftir skriðulopið í morgun



SKRIÐULOP

*Umleið 500 rúmmetrar av eyri og mold riðu oman á Syðradalsvegin, og bilarnir noyddust at koyra fleiri ferðir, áðrenn alt var ruddað burtur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Randi Jacobsen

Orðatakið um, at har ein skriða er lopin, er onnur væntandi, kom at ganga út í morgun ella i nátt, tá ið tað leyp oman á Syðradalsvegin á Streymoynni.

Skriðulopið var vestan fyri Fossdal, uppi á Leiti, júst í sama stað, har tað leyp herfyri.

Lopið hesaferð var størri enn seinast. Umleið 500 rúmmetrar av eyri, mold og steinum riðu oman og stongdu vegin.

Tíðliga í morgun fóru fólk og bilar frá Landsverki at rudda vegin, og um middagsleitið var koyrandi aftur.

Í Syðradali búgva tvær familjur, og har var ein drongur, sum skuldi í skúla í morgun. Tað slapp hann, hóast ikki var koyrandi, tí bilur stóð fyri hinum hinumegin lopið.

Landsverk hevði væntað fleiri lop, nú blot er komið í, og tí hava menn frá Landsverki koyrt runt og hugt, har skriðulop plaga at vera. Heini Eysturoy visti í morgun ikki um nakað annað størri lop, men nógvastaðni er smágrót komið oman á vegirnar.

*randi@sosialurin.fo*

## DRUKNAÐI Á TOFTAVATNI

**VANLUKKA** Ein 25 ára gamal maður av Toftum varð páskakvøld funnin druknaður á Toftavatni

Randi Jacobsen

Umleið klokkan 18 páskakvøld fór ein 25 ára gamal maður av Toftum, sum hann var vanur at gera, ein túr við hundi sínum.

Nakað væl eftir møtti ein familja hundinum einsamallum, og tey óraðu ilt.

Farið varð at leita og í Toftavatni, við Presthólm, lá tann 25 ára gamli maðurin druknaður, inni við land.

*randi@sosialurin.fo*

# Yvir 100 smáskaðar á ungdómstúrinum

**SKAÐAR** Samarittarnir hjá Reyða Krossi høvdu úr at gera á ungdómstúrinum umborð á Norrønu um páskirnar. Men tíbetur var ongin álvarsligur løstur



Rigmor Dam

Tá Norrøna stevndi út av Havnini mánadagin í stilluviku, var umráðandi, at trygdin umborð var í top. Dýrabara lastin var krúnan av Føroya ungdómi, sum hevði valt at halga páskirnar til Norrønu. Tí var millum annað eitt lasarett við samarittum frá Reyða Krossi innrættað í sonevnda »konferensurúminum«, har skaddir ungdómar kundu leitað sær hjálp.

Steinbjørn V. Olsen, aktivitetsleiðari, greiðir frá, at tey vóru fýra samarittar umborð, og tey høvdu úr at gera allan túrin.

- Vit skráseta allar tilburðir og komu upp á 110 viðgerðir á ungdómstúrinum, sigur aktivitetsleiðarin, sum tó fegnast um, at talan bert var um smærri skaðar. Sjey ferðir vóru yvirmenn boðsendir, tí teir hava viðkaða heimild at viðgera og meta um skaðar.

- Samanumtikið var tað ein friðarligur ungdómstúrur og skilið gott umborð, sigur Steinbjørn V. Olsen, sum samanber uppgávuna umborð við festivalarnar.

- Tað eru somu fólkini, sum ganga á festivalum, og skaðarnir líkjast eisini nógv, sigur hann við Sosialin.

Millum skaðarnar var onkur sum keikti sær fótin og onkur hevði drukkið í meira lagi. Álvarsligasti tilburðurin var helst eitt epileptiskt herðindi, tá skipið lá á Seyðisfjørðinum. Har varð lækni boðsendur, og spældi tað væl av.

Steinbjørn V. Olsen ásannar tó, at fýra samarittar er í minna lagi á einum slíkum túri. So næsta ungdómstúr verða seks samarittar umborð, tá Norrøna stevnir út av Havnini við ballingarhugaðum ungdómum.

*rigmor@sosialurin.fo*

### Hvat er ein samarittur?

Samarittarnir eru sjálvboðin starvsfólk við útbúgving í vanligari og sálarligari fyrstuhjálp. Samarittarnir eru útbúnir til at geva eina skjóta og dugnaliga fyrstuhjálp á skaðastaðnum.

Samarittarnir hjá Reyða Krossi Føroya kunna:

* Geva lívbjargandi fyrstuhjálp (allir samarittar hava útbúgving í at nýta hjartastartara)
* Geva sálarliga fyrstuhjálp
* Geva lívsumráðandi upplýsingar á ein professionellan hátt til t.d. lækna, sjúkrabilastarvsfólk
* Geva vanliga fyrstuhjálp